# TÍÐINDI

SAMBAND
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
tlf 341800

STUTT SAGT

## Ávaringarskipanin meldaði feil

**Tá Danmarkarflogfelagið hjá Atlantsflog var á veg til Føroya í gjár, vísti ávaringarskipanin ein feil við lúkuni til eitt av hjólunum**

FLOGFERÐSLA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Talan var um ein indikatiónsfeil. Flogskiparin varnaðist, at skipanin vísti ein feil við lúkuni, sum skal latast aftur, tá hjólini fara upp. Men hetta hevði kortini einki upp á seg, og flogfarið lendi í Vágum í øllum góðum og uttan trupulleikar, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflog.

Sosialurin frætti, at ferðafólkini fingu at vita, at onkrir trupulleikar vóru, og at flogfarið møguliga skuldi lenda í Noreg, men sambært Magna Arge, so var talan um ein indikatiónsfeil, og at alt kortini var í lagi.



## Skiftu allar lutirnar í skipanini

**Allir komponentar eru skiftir og øll skipanin við flapsunum varð kanna í botn, áðrenn flogfarið, sum tvær ferðir hevði trupulleikar við flapsskipanini, fór á flog aftur í síðstu viku**

FLOGFERÐSLA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Næstseinasta sunnukvøld kom flogfarið hjá Atlantsflog, sum hevði trupulleikar við flapsunum, aftur í Vágar.

Tvær ferðir mátti flogfarið trygdarlenda í Bergen, tí trupulleikar vóru við flapsunum, sum gjørdi, at flogfarið ikki kundi seta seg á stuttu breytini í Vágum.

Magni Arge, stjóri í Atlantsflog sigur, at hann ikki neyvt kann siga, hvat bagdi skipanini, men at øll skipanin varð gjøgnumgingin hjá Malmö Aviation, har allir komponentarnir vórðu skiftir út, og alt varð testað í botn.

Spurdur um hetta er ein kendur trupulleiki við hesum flogførunum sigur Magni Arge, at trupulleikin ikki er ókendur, tó at hann ikki verður so nógv dramatiseraður aðrastaðir.

– Tað er bara í Føroyum vit hava hendan trupulleikan við stuttu breytini. Høvdu vit eina nóg langa breyt, so hevði hetta ikki verið nakar trupulleiki.

Hann leggur eisini dent á, at tað er í evsta konsekvensi, at dekkini kunnu bresta.

– Tey kunnu eisini bresta undir eini ov harðari lending, vísir hann á.




*Lamborghini Gallardo V10 hjá Sp/f Bilrøkt. Jákup á Borg saman við umboði frá Top Gear, og Jóannes og Regin, sum báðir arbeiða hjá Bilrøkt*

# Tvær flugur við eitt smekk

Í sambandi við at fólk frá Top Gear Magazine í løtuni eru her við einum Lamborghini Gallardo V10 og gera upptøkur til teirra blað, høvdu teir ynski um at hitta ein av føroysku landsliðsleikarunum frá landsdystinum millum Føroyar og Skotland á Svangaskarði í 2002, sum endaði 2-2, samstundis sum Lamborghini bilurin trongdi til eitt vask.

Hjá Jákupi á Borg, sum rekur fyritøkuna Sp/f Bilrøkt, hittu teir bæði landsliðsleikaran og fingu bilin vaskaðan. Jákup legði nevniliga upp til bæði tey føroysku málini sum liðfelagin í B36, John Petersen, skoraði.

*mg*

# Hava ruddað misskiljingar um heilsuskúlan av vegnum

**– Eftir ein sera góðan fund við Jògvan á Lakjuni, er allur ivi nú ruddaður av vegnum, sigur Ása Olsen, forkvinna í Heilsuhjálparafelagnum**

HEILSUÚTBÚGVINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er allur ivi um tær føroysku heilsuútbúgvingarnar ruddaðar av vegnum.

Heilsuhjálparafelagið stúrdi annars so illa fyri útbúgvingunum, at tey sendi øllum politikarum skriv, har felagið mótmælti framferðini hjá Mentamálaráðnum.

Ein nýggj lóg er gjørd um heilsuútbúgvingar í samstarvi við Heilsuhjálparafelagið og onnur fakfólk á økinum og eftir henni skal útbúgvingin sum heilsuhjálpari vera ein beinleiðis yrkisførleikagevandi útbúgving.



*- Vit fingu at vita, at talan var um eina misskilting og hon er nú burtur,, sigur Ása Olsen, forkvinna í Heilsuhjálparafelagnum*

Men nú mentamálaráðið er farið at orða kunngerðir í sambandi við útbúgvingarnar, er Heilsuhjálparafelagið komið eftir, at nú er ætlanin, at útbúgvingin skal vera ein støðisútbúgving.

Tað var ikki ætlanin og tí rópa tey nú varskó.

Og tað fekk Mentamálaráðið at kalla felagið til fundar at viðgera støðuna.

– Vit høvdu ein sera góðan fund og nú er allur ivi ruddaður av vegnum, sigur Ása Olsen, forkvinna í Heilsuhjálparafelagnum.

Hon sigur, at á fundinum fingu vit at vita, at talan var um eina misskilting, men nú er allur ivi ruddaður av vegnum,

Hon sigur, at á fundinum tosaðu tey nógv um, hvat eitt støðisár er, og, hvat tað merkir í hesum føri.

– Ein orsøk til, at misskilting er komin í, er, at higartil hava heilsuútbúgvingarnar hoyrt undir Sjúkrasystraskúlan, men nú eru tær fluttar yvir til Yvrkis- og miðnámsskúladeildina, og tað er har, at misskilting er hend

– Landsstýrismaðurin var sera harmur um, at misskilting var komin í, og legði hann dent á, at útbúgvingin til heilsuhjálpara skal ikki kallast støðisár.

Ása Olsen sigur, at landsstýrismaðurin lovaði teimum somuleiðis, at útbúgvingin verður ikki broytt til nakað støðisár, men at hon eisini framyvir verður ein beinleiðis yrkisførleikagevandi útbúgving, akkurát, sum hon er í dag.

– Sostatt er nú ongin ivi um, at allar misskiljingar um útbúgvingarnar eru ruddaðar burtur, sigur forkvinnan í Heilsuhjálparafelagnum.